VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

**Dagfesting:** 31.08.2021 kl. 18:00
**Fundarstaður:**
**Málnr.:** 21/00003

| | |
|---|---|
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Martin Simonsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, ~~Jens Gaardlykke~~, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | Martin Simonsen |
| Ikki til staðar: | Rósa Samuelsen, Jens Gaardlykke |
| Aðrir partar: | Anna Malena Thomassen |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| Málsyvirlit | | | Síða |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 6/21 | 21/00105-10 | 7. Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 109/21 | 21/00198-3 | Umsókn um marknaumskipan av matr. nr. 41 og 31b í Sandavági | 4 |
| 110/21 | 21/00242-11 | Skúlin á Giljanesi: Umsókn um byggiloyvi - nýbygging 2. byggistig | 5 |
| 111/21 | 21/00245-5 | Skúlin á Giljanesi: Umsókn um byggiloyvi - niðurtøka | 7 |
| 112/21 | 21/00396-6 | Umsókn um byggiloyvi til íbúðir á Steigarbrekku. matr. nr. 4y í Sandavági | 8 |

VÁGA KOMMUNA

| | | | |
|---|---|---|---|
| 113/21 | 21/00398-4 | Umsókn um byggiloyvi til goymslurúm á matr. nr. 332b í Sandavági | 9 |
| 114/21 | 21/00416-2 | Umsókn um byggiloyvi til goymslurúm á matr. nr. 285b í Sandavági | 10 |
| 115/21 | 21/00440-2 | Umsókn um samanlegging av matr. nr. 220i og 214 í Miðvági | 11 |
| 116/21 | 21/00487-3 | Umsókn um marknaumskipan millum 122a og 251 í Sandavági | 12 |
| 117/21 | 21/00488-5 | Byggiloyvi til havastovu á matr. nr. 224b í Sandavági | 13 |
| 118/21 | 21/00510-3 | Umsókn um loyvið at seta vindmátara upp í Sundshaga | 14 |
| 119/21 | 21/00536-2 | Stuðul til standmyndina av "Seyðamanninum á Sondum" | 16 |
| 120/21 | 21/00541-1 | Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at leggja depositum á, tá gravi- og byggiloyvi verða útskrivað. | 17 |
| 121/21 | 21/00550-1 | EXTRA21_02 Eykaætlan 02 2021 | 19 |
| | | | |

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 6/21 7. Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.08.2021 | 6/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 31. august 2021:**

Formansváttan:________________

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 109/21 Umsókn um marknaumskipan av matr. nr. 41 og 31b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 74/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 109/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent Vága kommunu umsókn um marknaumskipan til ummælis.

Soleiðis at matr. nr. 41 letur 42m$^2$ til matr. nr. 31b, í Sandavági.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 31. august 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 110/21 Skúlin á Giljanesi: Umsókn um byggiloyvi - nýbygging 2. byggistig

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 75/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 110/21 |

**Málslýsing:**

Tekniska umsiting hevur móttikið umsókn um byggiloyvi til 2. byggistig av Skúlanum á Giljanesi.

Umsitingin hevur, við hjálp frá HMP byggimálsviðgjørt umsóknina, og lýkur bygningurin øll krøv til bruna og innrætting, sum eru ásett í byggisamtykt og BK17.

Uttanumøkið lýkur ikki krøvini til parkeringspláss, tí tá bygggistig 2 stendur liðugt eru bert 52 parkeringspláss tøk.

Byggisamtyktin ásetur at tað skulu verða 124 parkeringspláss.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Tekniski leiðarin hevur gjørt eina varliga meting av kostnaðinum at gera tey 72 parkeringsplássini, ið resta í fyri at lúka kravi í byggisamtyktini. Hann metir at hesi kunnu gerast fyri 1,2 til 1,5 milliónir krónur.

Eisini metir tekniski leiðarin at at tað átti at verði gjørd ein rundkoyring til avsetan av børnum, hendan kostar umleið 150 til 200 túsund.

Samanumtikið kann roknast við einum meirkostnaði millum 1,4 og 1,7 milliónir krónur.

Viðmerkjast skal eisini, at ongar tekningar ella skjøl eru viðheft hesi málslýsing, tí tilfari er so rúgvusmikið og allir politikarar kenna tilfari frammanundan.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt at geva byggiloyvi, treytað av at talið av parkeringsplássum verður minst 124.

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 111/21 Skúlin á Giljanesi: Umsókn um byggiloyvi - niðurtøka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 76/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 111/21 |

**Málslýsing:**

Tekniska umsiting hevur móttikið umsókn frá SNA Arkitektum um loyvi at takað gamla skúlan niður.

Niðurtøkan skal gerast í sambandi við bygging av 2. byggistigi av nýggja skúlanum.

Umsitingin hevur kannað umsóknina, og lýkur hon tær treytir, ið vanliga verða settar til tílíkt arbeiðið.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Tekniski leiðarin mælir til at geva loyvi.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

# 112/21 Umsókn um byggiloyvi til íbúðir á Steigarbrekku, matr. nr. 4y í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 77/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 112/21 |

## Málslýsing:

Westtech søkir vegna Bústaðir um byggiloyvi til fimm íbúðir á matr. nr. 4y í Sandavági.

Matrikulin liggur í øki B: Sethúsakøki, og ásetur byggisamtyktin niðanfyristandandi tá talan er um raðhús:

§13 Ásetingar fyri øki B: Sethúsaøki

1. Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 bústaðum ***og -eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, punkthús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski.***
   Í sambandi við búðstaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av, at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.Spælipláss/ Sparkivallir/ trivnaðarøki, kunnu gerast á B-økjunum.

Tekniska umsiting hevur byggimálsviðgjørt umsóknina, og lýkur hon allar treytir í byggisamtyktini.

## Tekniska nevnd 17. august 2021:

Viðmælt.

## Býráðið 31. august 2021:

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:________

VÁGA KOMMUNA

# 113/21 Umsókn um byggiloyvi til goymslurúm á matr. nr. 332b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 78/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 113/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr, 332b í Sandavági søkir um loyvi at byggja goymslurúm.

Goymlurúmið er 3600mm x 1700mm og stendur upp at marki móti nærmastu grannum.

Grannahoyring hevur verið, og eitt svar kom, ið játtar loyvi at gera goymslurúmið.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 31. august 2021:**

Tórdis D. Johannesen luttók ikki í viðgerðini.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

# 114/21 Umsókn um byggiloyvi til goymslurúm á matr. nr. 285b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2021 | 66/21 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 79/21 |
| 3 Býráðið | 31.08.2021 | 114/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 285b í Sandavági søkir um loyvi at byggja goymslurúm.

Goymslurúmið er 15,84m$^2$.

Á grundstykkir, sum eru minni enn 300m$^2$ , og í øki, sum eftir meting byggivaldsins er eldri tættbygdur býlingur, er loyvi til nýtingarstig á 0,45. Um loyvi verður givið til byggingina søkt er um kemur nýtingarstigið upp á 0,46, sum má metast at verða eitt ógvuliga lítið frávik.

Málið hevur verið til grannahoyring, og tá freistin var farin, var ongin viðmerking komin.

**Tekniska nevnd 08. juni 2021:**

Málið verður tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 31. august 2021:**

Tórdis D. Johannesen luttók ikki í viðgerðini.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 115/21 Umsókn um samanlegging av matr. nr. 220i og 214 í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 80/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 115/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um samanlegging av matr. nr. 220i og 214 í Miðvági til ummælis.

Tað er sami eigari av báðum matriklum, og viðkomandi hevur fingið byggloyvi til garagju, við tí treyt at matriklarnir verða lagdir saman.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 31. august 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 116/21 Umsókn um marknaumskipan millum 122a og 251 í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 81/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 116/21 |

### Málslýsing:

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um marknaumskipan millum 122a og 251 til ummælis.

Matr. nr. 122a letur 8 gyllin til matr. nr. 251.

### Tekniska nevnd 17. august 2021:

Viðmælt.

### Býráðið 31. august 2021:

Viðmælt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 117/21 Byggiloyvi til havastovu á matr. nr. 224b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 82/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 117/21 |

**Málslýsing:**

Eigarnir av matr. nr. 224b í Sandavági, søkja um loyvi at byggja havastovu á Steigarbrekku 9.

Havastovan verður bygd í mark móti norðuri og er 21m2 til víddar.

Tekningarnar hava verið til grannahoyring, og mótmæla grannarnir ætlanini.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Frámælt at geva byggiloyvi.

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 118/21 Umsókn um loyvið at seta vindmátara upp í Sundshaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 84/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 118/21 |

**Málslýsing:**

Hiddenfjord søkir um loyvi at seta vindmátara upp í Sundshaga matr. nr. 375a í Sandavági.

Neyðugt verður at seta upp eina mastur, ið er 80m ella 100m høg. Staðsetingin er víst niðanfyri




Masturin skal standa uppi í eitt ár.

Endamálið við vindmátingunum, er at kanna, um møguleikar eru fyri at útvinna grøna orku úr vindi í økinum.

Hagastýrið í Sundahaga og lokala friðingarnevndin eru kunna um málið. Hagastýrið í Sundshaga, hevur givið loyvi at seta mátiútgerðina upp.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt at geva loyvi, treytað av at øll onnur neyðug loyvi fyriliggja.

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 119/21 Stuðul til standmyndina av "Seyðamanninum á Sondum"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.08.2021 | 76/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 119/21 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini fyri 2020 vóru kr. 400.000,- avsettar á kontoini «Stuðul til mentan» Hesin peningur bleiv ikki brúktur í 2020. Á fíggjarætlanini fyri 2021 bleiv onki avsett til endamálið. Standmyndin bleiv uppsett í 2021 og alt arbeiðið er nú liðugt. Standmyndin kostar tils. kr. 1.629,487,- + mvg. Inngjøld frá stuðlum er kr. 1.400.500,- Verður alt mvgið afturgoldið, verður parturin hjá kommununi kr. 228.987,- umframt tímaløn, sum er gjørt av arbeiðsfólki hjá kommununi.

**Fíggjarnevndin 26. august 2021:**

Mælt verður til at veita ein stuðul uppá kr. 228.987,-

**Býráðið 31. august 2021:**

Dagbjørn Hansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

# 120/21 Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at leggja depositum á, tá gravi- og byggiloyvi verða útskrivað.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Tekniska nevnd | 17.08.2021 | 88/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.08.2021 | 78/21 |
| 3 Býráðið | 31.08.2021 | 120/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin leggur uppskot fyri býráðið um at áleggja eitt depositum á kr. 20.000,- , tá gravi- og byggiloyvi verða útskrivað.

Hetta depositum skal verða fyri at dekkað møguligar útreiðslur, sum kommunan kann fáa av at umvæla møguligar skaðar á veg, kantsteinar o.a., sum kunnu verða gjørdir í sambandi við arbeiði við útgrevstri ella bygging.

Um skaði er gjørdur, ið kostar meir enn kr. 20.000,- , verður rokning send fyri írestandi upphæddina.

Um ongin skaði er hendur tá byggingin er liðug fær ánarin peningin goldnan aftur.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Umsitingin metir at hetta hevði verði eitt gott amboð, og vildi hetta lætt munandi um arbeiðið hjá umsitingini, tí um eitt depositum áliggur sleppur umsitingin frá at krevja pening inn fyri skaðar eftir grevstur og bygging.

Eisini vil hetta gera sítt til at byggiharrar ansa betur eftir tá arbeitt verður.

**Tekniska nevnd 17. august 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 26. august 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan: ____________

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 121/21 EXTRA21 02 Eykaætlan 02 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.08.2021 | 79/21 |
| 2 Býráðið | 31.08.2021 | 121/21 |

**Málslýsing:**

**1. viðgerð av eykaætlan 02 2021**

| | | |
|---|---|---|
| § 1. | Kommunal fyrisiting | kr. 1.450.000,- |
| § 2. | Almanna- og heilsumál | kr. 100.000,- |
| § 3. | Børn og ung | kr. 150.000,- |
| § 4. | Undirvísing - rakstur | kr. 157.000,- |
| § 4. | Undirvísing - løga | kr.-1.784.500,- |
| § 5. | Mentan & frítíð | kr. 250.000,- |
| § 6. | Teknisk mál rakstur – meir avseting | kr. 677.500,- |
| § 6. | Teknisk mál rakstur – minni avseting | kr.-1.000.000,- |

**Viðmerkingar:**

§ 1. Meiravseting til lønir, umboðan og keyp av tænastum.
§ 2. Meiravseting til frípláss.
§ 3. Meiravseting til systkinafrádrátt.
§ 4. Meiravseting til svimjing (Kvívík) og til skúlabarnaflutning.
§ 4. Minni avseting til skúlabygging.
§ 5. Meiravseting til stuðul til mentan (Seyðamaðurin á Sondum)
§ 6. Meiravseting til viðlíkahald av bygningningum.
§ 6. Minni avseting til vegir

**Fíggjarnevndin 26. august 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 31. august 2021:**

Samtykt.

Formansváttan:__________

Fundurin lokin kl. 18:35

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Martin Simonsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:________

VÁGA KOMMUNA

Formansváttan: